

# Samkomublaðið fyri jan/feb 2017



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar





www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið

## Røtur og rótfestan



Martin Mohr í Grund

**Røtur**
Eitt træ sær ofta sera flott og stórt út, og ein kann undrast á vøkru litirnar og hvussu stórsligið tað er. Hetta er tað, vit síggja, tað sjónliga, men træið hevur eisini ein ósjónligan part, ella ið hvussu er er hesin parturin undir jørð. Træið hevur røtur, ofta sera langar og kraftigar røtur. Hevði tað ikki havt røtur, tá megnaði tað ikki at standa ímóti vindi og vildi fokið, um bert lotið var nóg kraftugt.  Somuleiðis hvør blóma og eitthvørt strá.

Hetta orðið, ið tú lesur, snýr seg um andaligan og persónligan vøkstur. Myndatalan er, at Guðs orð, t.e. bíblian, er tað, ið gevur okkum røtur, sum ger, at vit kunnu standa ímóti tí ónda.

**Rótfestan - Endurtøka av Guðs orði**
Ein góður máti at fáa orðið rótfest, er at endurtaka Guðs sannleikar.
Eg havi ein lista av setningum, sum eg siteri fyri mær sjálvum. Allir setningarnir taka støði í bíbliuni. Eg endurtaki teir fyri mær sjálvum, í tí stilla, fleiri ferðir um dagin.  Setningarnir siga mær, hvør eg eri, hvussu eg skal navigera, hvat meiningin er við tí, eg geri o.s.fr., alt sambært bíbliuni.

**Her eru nakrir setningar:**
"Jesus er nr.1 í mínum lívi. Eg livi fyri at upplyfta og æra Hann"
"Eg vakni upp til eitt málrættað lív við kós og meining hvønn tann einasta dag"
"Í dag verður heimurin eitt betri og annarleiðis stað, tí eg tæni Jesusi"
"Eg elski menniskju, vísi veruligan áhuga fyri teimum og trúgvi tað góða um øll" (Luk 10,27)

**Lúka - Viðlíkahald**
Ert tú eins og eg, so hevur tú tørv á, at Guð infiltrerar títt sinn hvønn einasta dag og hvønn einasta tíma. Hetta soleiðis, at tann óndi ikki fær loyvi at koma við skeivum tonkum og fellir tíni trø. Tú mást gera honum greitt, at hann ikki hevur nakað føri í tínum tonkum, tí Kristus býr í tær og hevur vunnið á øllum, eisini ringum tankum, mótloysis anda o.s.fr. Hetta kanst tú gera við at tosa Guðs orð. Hetta gert tú við at dagliga endurtaka Guðs sannleikar yvir títt lív.

Vit eiga at taka ábyrgd fyri egnum lívi og minna okkum á Guðs orð í einum dagligum samanhangi. Lat okkum tí standa fast við Guðs orð og vaksa!

# Skrá fyri jan/feb

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 9 jan. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 10. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 12. jan. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 14. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við ungdómsleiðsluni |
| Sunnudagur | 15. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen<br>Sangframførsla við Eyðun Jacobsen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16. jan. | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Sørvági (fríkirkjunetverkið) |
| Týsdagur | 17. jan. | kl. 10.00: | bønardagur |
| Leygardagur | 21. jan. | | Lindin skipar fyri konsert í Kelduni<br>(tíð kemur seinni) |
| Sunnudagur | 22. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskum leiðarum<br>(AWAKE, sunnudagsskúlin, húsbólkatænastan)<br>Sangframførsla við Terja B. Vestergaard. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 23. jan. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 24. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 26. jan. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 28. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við Búgva Olsen |
| Sunnudagur | 29. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj (breyðbróting) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 30. jan. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 31. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 4. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við Alice Frederiksberg |
| Sunnudagur | 5. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Jóhan Petur Johannesen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |
| | | kl. 18.00: | Møti (sí undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 6. febr. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 7. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 11. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við vitnisburðum frá<br>Hannu S. Poulsen og Tóruri Zacharisen. |
| Sunnudagur | 12. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sunnivu Poulsen |

# Lýsingar

**Spennandi møti sunnudagar kl. 18**
Sum nakað nýtt í 2017, fara vit at hava eitt møti hvønn seinasta sunnudag í mánaðinum, ið verður kl.18. Møtini verða til at byrja við í lítlasali. Hesi møti eru ætlaði til øll fólk, bæði ung og eldri. Endamálið við hesum møtum er, at menniskju verða frelst, grødd, uppbygd, styrkt, fáa eina nýggja vón – ja, sagt í stuttum, at fólk verða møtt av Gudi.
Sum samkoma hava vit eisini ein møguleika her at bjóða øðrum við. Øll eru vælkomin.
Tað fyrsta møti av hesum slagi verður 29. januar.

**Bókasavnið í Kelduni**
Arbeitt hevur verið við at byggja upp bókasavn í Kelduni. Tað er fleiri, sum hava latið bøkur og leksikon til bókasavnið, og tað eru vit sera takksom fyri. Nakrar bøkur eru eisini keyptar. Endamálið við bókasavninum er at stimbra lesing og gransking í Guds orði, gudfrøði og kristnum bókmentum. Møguleiki er at læna tær flestu bøkurnar. Lánitíðin er ein mánaður. Bókasavnið hevur ikki í byrjanini fastar upplatingartíðir. Tað ber til at læna bøkur, tá man er í Kelduni (sjálvavgreiðsla), t.d. í samband við møtir og tiltøk. Annars ber til at læna lykil.
Frá sunnudegnum 8. januar ber til at læna bøkur.
Rúni Rasmussen hevur ábyrgd av bókasavninum (tel 551041 runir79@gmail.com).

**Páskastevnan 13.-.17. apríl**
Í ár hevur Keldan aftur tann framíhjárætt at vera vertur fyri páskastevnuni. Páskastevnan er ein møguleiki hjá okkum sum samkoma at tæna øllum okkara landi og fólki. Okkara bøn er, at øll menniskju, sum koma á páskastevnuna, skulu verða møtt við Guds kraft. Fyri at skapa bestu fortreytir fyri at Harrin skal sleppa at virka og at menniskju skulu blíva møtt við Guds kraft, krevur tað, at vit sum samkoma standa saman í bøn og praktiskum arbeiði. Vit koma at tæna fleiri enn 1000 menniskjum, sum koma úr øllum landinum fyri at søkja og tilbiðja Harran saman við okkum í Kelduni á páskum. Latið okkum saman longu nú byrja at søkja Harran í bøn, og sum einstaklingar hugsa um, hvar vit við okkara tíð og praktiska arbeiði kunnu vera við at geva Harranum tær bestu fortreytir at møta menniskjum á páskastevnuni. Meiri kunning kemur seinni.

**Global Leadership Summit 2017**
GLS 2017 verður 13. - 14. januar. Nógvir spennandi talarar eru á skránni. Samrøða við Jastrid Høj verður leygarmorgun 14. januar. Les meira á www.gls.fo.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584